# Súni spældi seinasta korterið



*Súni Olsen spældi seinasta korterið av dystinum ímóti AC Horsens í gjár*

**Gøtumaðurin var settur á vøllin eitt korter fyri leiklok, tá AaB leikti javnt 2-2 ímóti AC Horsens í superliguni í gjár**

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

Javnleikur á heimavølli ímóti Horsens er óivað eitt vónbrot hjá aalborgensarum, men tað kundi verið verri, tí fimm minuttir fyri leiklok kom útiliðið framum. AaB javnaði tó við brotssparki, tá tveir minuttir vóru eftir at leika.

Norðmaðurin Fredrik Winsnes legði Aab framum stutt fyri steðgin, og tað var líkt til, at Aab fór at koyra sigurin heim. Men í seinna hálvleiki javnaði Besart Berisha fyrst fyri Horsens, og síðani legði hann eisini útiliðið framum. Aab bjargaði tó tí eina stiginum, tá Rasmus Würtz skoraði frá brotssparksblettinum.

Súni Olsen varð skiftur inn fyri áleyparan Simon Bræmer, tá eitt korter var eftir, og Súni leikti á miðvøllinum tað, ið eftir var av dystinum. Jón Rói Jacobsen sat á bonkinum allan dystin, og Johan Byrial var ikki við á Horsens liðnum.

## Vunnu uttan Claus

Claus Bech Jørgensen var ikki við í hópinum, tá Coventry um vikuskiftið enn einaferð streyk avstað við trimum stigum.

Hesa ferð var talan um dyst móti Sheffield United, sum er næst ovasta liðið á stigatalvuni í enska Championship.

Longu eftir fimm minuttum hevði Coventry lagt seg á odda, og tá teir eftir hálvum tíma øktu um leiðsluna, tótkist sigurin greiður.

Tað eydnaðist eisini at halda fast um leiðsluna til dystarenda, og nú tykist tilveran av álvara vera spennandi hjá Claus og teimum. Eftir eina sera laka byrjan, har liðið leingi í niðurflytingarvanda, men seinastu mánaðirnar hevur kurvan peiggjað beint uppeftir.

Enn eru tó sjey stig upp til play-off plássini, so nakra veruliga vón um uppflyting munnu spælararnir ikki hava fingið enn.

**-mørk**

**Úrslit**

**Danska SAS-ligan**

| | |
|---|---|
| Brøndby-FCK | 3-0 |
| OB-FCN | 2-0 |
| Viborg-Silkeborg | 2-3 |
| Esbjerg-FCM | 2-0 |
| Aab-AC Horsens | 2-2 |
| AGF-SønderjyskE | 1-1 |

Premier League

| | |
|---|---|
| Blackburn-Aston Villa | 2-0 |
| Everton-Fulham | 3-1 |
| Portsmouth-Manchester City | 2-1 |
| Sunderland-Wigan | 0-1 |
| Bolton-West Ham | 4-1 |
| Chelsea-Tottenham | 2-1 |
| Birmingham-WBA | 1-1 |
| Arsenal-Liverpool | 2-1 |
| Charlton-Middlesbrough | 2-1 |
| Manchester Utd-Newcastle | 2-0 |


# Ítróttarsosialurin

## – vit eru har tað hendir




## Arnold gevst í KÍ

Ein av føstu spælarunum á besta liðnum hjá KÍ nógvu seinastu árini hevur valt at gevast í felagnum, men hann er sinnaður at halda fram í øðrum felag

Arnold Joensen og KÍ eru komin ásamt um, at seinasta árið av sáttmálanum millum partarnar skal strikast. Arnold sigur seg ikki hava hug at ganga undir treytirnar á besta liðnum hjá KÍ, og tí steðga partarnir við samstarvinum.

– Vit hava gjørt eina semju um, at sáttmálin verður annuleraður. Eg havi framvegis hug at spæla fótbólt, og tað er ikki óhugsandi, at eg haldi fram í onkrum øðrum felag, sigur 31 ára gamli Arnold Joensen.

Hann kom á besta liðið hjá KÍ sum 16 ára gamal og hevur spælt 1. deildarfótbólt øll árini síðani. Eitt skifti var hann í B68, men fyri tað mesta hevur hann spælt við KÍ.

**-mørk**

## Hollendingur í B68

Sunnudagin kom Ralph van Dorren til Toftir, har hann ætlandi skal styrkja um miðvøllin í ár

Á heimasíðuni sigur B68, at talan er um miðvallara við sterkum verjudygdum. 24 ára gamli van Dorren er ætlaður úr Maastricht. Hann hevur eisni spælt við felagnum, sum ber býarnavnið, eins og hann hevur spælt við FC Eindhoven í næst bestu hollendsku deildini.

Til stuttleikar kann nevnast, at hetta er fyrsti hollendingurin, sum er í føroyskum fótbólti, síðani HB á sinni gjørdi sáttmála við Abraham Mendez. Tann søgan gjørdist tó ikki nakað eydnusamt ævintýr, men vónandi hava toftamenn betri vónir um van Dorren.

**-mørk**

## Útreinsan í Liverpool

Venjarin hjá Liverpool, Rafael Benitez, hevur ætlanir um eina útreinsan av álopsleikarum í summar

Málturkurin hjá Liverpool er nú vorðin so álvarsamur, at venjarin hevur mist tolið við sínum álopsleikarum. Benitez ásannar, at ein radikal broyting er neyðug, um liðið skal standa seg í heimligu og evropeisku kappingini.

– Um áleypararnir ikki skjótt fara at skjóta nøkur mál, verði eg noyddur at hyggja eftir øðrum loysnum, sigur Benitez, ið fegin vil hava ein áleypara, ið kann skjóta eini 15-20 mál hvørt kappingarár.

Tað er eingin loyna, at áleypararnir hjá Liverpool hava torført við at finna netmeskarnar. Teir fýra áleypararnir (Crouch, Morientes, Cissé og Fowler) hava bert skotið EITT mál í hesum árinum. Tað er ikki beinleiðis eitt álop, ið fær verjuleikarar at rista í brókunum.

Ovast á ynskilistanum hjá Benitez stendur David Villa, ið spælir við Valencia. Síðani hevur Benitez óivað eyguni við Fernando Torres hjá Atletico Madrid. Michael Owen er eisini ein leikari, ið ofta verður settur í samband við Liverpool, men Newcastle fer neyvan at lata áleyparan fara lættliga.

**SíS**

## Farin at leita eftir nýggjum venjara

Enska fótbóltssambandið váttar nú, at leitingin eftir nýggjum enskum landsliðsvenjara er byrjað.

Tað váttaði sambandið fyri Sky News í gjárkvøldið, eftir at formaðurin Brian Barwick, var sæddur í samrøðu við Charlton venjaran Alan Curbishley.

Umboð fyri enska fótbóltssambandi sigur við Sky, at ætlanin er at hava samrøður við nógv ymisk fótbóltskøn um starvið, eisini venjarar, sum kunnu hugsast at fáa tilboðið.

Ætlanin er heilt avgjørt at seta nýggja venjaran, áðrenn HM í summar.

Og nú nýggjur landsliðsvenjari skal setast, er júst Alan Curbishly ein, sum hevur verið nevndur, sum ein ið hevur ein møguleika at taka við eftir Sven Gøran Eriksson

Men aðrir, sum hava verið nevndir, eru Martin O´Neill, Sam Allardyce og Stuart Pearce.

**-Áki**